# an útdeyð



## Pátrúgv má víkja fyri deadline

Vanligt er, at mann ikki kastar uppá í binding fríggjadagar. Men hetta er ikki nakað, ið ávirkar fyritøkuna Guðrun og Guðrun.

- Vit mugu arbeiða tá vit kunnu, og so má pátrúgvin víkja fyri deadline, sigur Guðrun Ludvig. Hon sigur tó, at hetta er nakað hon hevur hoyrt um fyrr, og at tað bara er jóladag, hon ikki kann finna uppá at kasta uppá.

- Vit kunnu ikki nýta gamla pátrúgv, tá onkur stendur og bíðar eftir einum plaggið, greiðir Guðrun Ludvig frá, sum ikki dugir at ímynda sær, hvussu tað hevði verið, um hon ikki kundi arbeiða fríggjadag.

*Hollendsk kanning vísir, at møguleikin at enda í einum ferðsluóhappið er minni fríggjadag 13. tí fólk eru meiri varin*

*Á húsi nummar 13 í gøtunum í Iran stendur 12+1*



## Skiparar hava slept fríggjadegi

Gamalt var, at mann ikki fór nýggjan túr fríggjadag, men Eyðstein Djurhuus, formaður í skipara- og navigatørfelagnum, heldur ikki, at hetta er nakað, sum skiparar ganga nakað serliga uppí longur.

- Fyrr vóru teir bara einar tríggjar túrar um árið við sluppunum, so tá bar til at gera soleiðis.

- Í dag hevur mann ikki tíð til hatta, og tí hava teir flestu slept tí, so mann kann siga, at pátrúgvin er vikin fyri peninginum, sigur Eyðstein Djurhuus, sum sjálvur ongantíð hevur hugsað um fríggjadagar sum nakað serligt, og enn minni trettanda dagin.

Hinvegin eru nakrir, sum ikki byrja nýggjan fyrsta túr ella fyrsta túr í einum ári ein fríggjadag.

*Ongin F-13 flúgvari varð gjørdur*



# Óeydna í 702 ár

**Fríggjadagin tann 13. oktober í 1307 gav Filip tann vakri boð um at drepa allar virknar limir hjá tempulriddarunum**

**FRÍGGJADAGUR 13.**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru søguliga orsøkir til, at júst 13 verður mett sum óeydnutal.

Gjøgnum 12. og 13. øld høvdu tempulriddararnir vunnið sær eina ráðandi støðu í Europa. Við vælsignilsi frá pávanum, stórum gávum frá kongastættini og góðum sambandi við bæði jødar og muslimar høvdu teir vunni sær somikið av jørð og valdi, at hetta eisini skapti mikla øvund.

Hvør orsøkin var til hetta, er enn ógreitt, men líka frá søguni um Kong Arthur og umvegis Holy Blood - Holy Grail, the last Knight og DaVinci Code verður dúgliga hugleitt um hetta.

Hvussu var og ikki, so syrgdi Filip 4. – Filip tann vakri – av Fraklandi fyri, at hetta fekk ein bráðan enda.

Hann skyldaði ovurhonds upphæddir til tempulriddararnar, sum eisini vóru framúr hermenn. Ta einu ferðina noyddist hann enntá at leita sær olmussu hjá teimum, tá hann flýggjaði undan uppreistrarsinnaða pøblinum.

Men við snildi fekk hann kortini steðga valdinum hjá tempulriddarunum. Við miðvísum lobbyarbeiði fekk hann Clemens V í pávasessin. Helst eftir at hava myrt bæði Bonifacius VIII og Benedikt XI.

Nýggi pávin hevði nógv at takka Filip kongi fyri, og tí kundi hann illa annað enn eftirlíka kravinum um, at tempulharrarnir skuldu beinast burtur. Millum annað við heiðinskapi sum grundgeving.

Fyri at eingin skuldi gruna ilt var neyðugt, at atsóknin varð framd í einum samskipaðum átaki kring alt Europa. Boð vórðu givin frá kongi í seglaðum brævbjálvum, sum ikki máttu latast upp fyrr enn um morgunin tann 13. oktober í 1307 – ein fríggjadag.

Enn eru ymiskar fatanir, um tað veruliga eydnaðist kongi at beina fyri tempulharrunum. Og eitt nú verður í Holy Blood – Holy Grail hildið fast um, at Prieuré de Sion í Fraklandi enn ansar eftir loyndarmálum teirra. Nakað sum granskarar tó hava ilt við at taka í álvara.

Men undir øllum umstøðum markeraði dagurin ein ræðuleika av slíkum slag, at fríggjadagur 13. enn verður roknaður sum størsti óeydnudagurin av øllum.

## Vit elska pátrúgv

**Hóast heilt fá veruliga trúgva, at fríggjadagur 13. er verri enn nakar annar dagur, so er tað sambært Eyðuni Andreassen púra náttúrligt, at vit halda ein tílíkan dag.**

**- Menniskjan dámar væl at gera nakað serligt burturúr, og tí hava vit valt okkum hepnar og óhepnar dagar. Tað er ein háttur at halda stýr á lívinum. Tí meti eg ikki, at fólk enn fara at sleppa hugsanini við fríggjadegi og talinum 13, men hetta verður meira undirhald enn verulig pátrúgv.**